LØGMANSSKRIVSTOVAN

Skrivarar til uttanríkistænastuna

Tvey skrivarastørv hálva tíð, ávikavist í Sendistovu Føroya í Bretlandi (London) og í sendistovu Føroya í Evropasamveldinum (Brússel), eru leys at seta frá 1. november 2002 ella skjótast til ber.

Uppgávur
Tann, ið settur verður, verður partur av dagligu arbeiðsgongdini á avvarðandi sendistovu. Starvið fevnir í høvuðsheitum um vanligar skrivarauppgávur, eitt nú samskipan av telefon, brævasamskifti, røkt av heimasíðu, røkt av útbúnaði og at hjálpa til við at samskipa millumtjóða tiltøk.

Førleikakrøv
Umsøkjarar eiga at hava skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving. Umsøkjarar við viðkomandi arbeiðsroyndum kunnu eisini søkja. Serligur dentur verður lagdur á góðan málkunnleika bæði í skrift og talu. Fyri sendistovuna í London verður dentur lagdur á føroyskt og enskt. Fyri sendistovuna í Brússel verður dentur lagdur á føroyskt, enskt, franskt og framskt.

Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevni, vera skilagóðir, áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar.

Starvsstaðið
Starvsstaðið verður ávikavist Sendistova Føroya í Bretlandi, 55 Sloane Street, London SW1X SR ella Sendistova Føroya í Evropasamveldinum, Rue d'Arlon 69, B-1040 Brussels. Sendistovurnar eru skipanarliga samrunnin partar av Løgmansskrivstovuni.

Setanartreytir
Størvini eru hálvtíðarstørv og verða skipað samsvarandi teim reglum, sum eru galdandi í danska uttanríkismálaráðnum fyri starvsfólk sett á staðnum. Roknað verður tískil við, at fólk hava sjálvstøðugan bústað nærhendis sendistovuni.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Herluf Sigvaldsson, deildarstjóra í uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni, tlf. 351010, ella til John Rajani, sendimann í London, tlf. +44 (0) 20 7333 0227 ella til Hákun J. Djurhuus, sendimann í Brússel, tlf. + 32 (2) 233 08 55.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum, lívrensli (CV) og viðmælum verða at senda

Løgmansskrivstovuni
Tinganesi
FO-100 Tórshavn
Telefaks 351015 · Teldupostur info@tinganes.fo

og vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin 8. oktober 2002.

Løgmansskrivstovan *er fyrisiting hjá løgmanni. Hon fevnir millum annað um uttanríkistænastuna við uttanríkisdeild og sendistovum í ávíkavist Bretlandi, Danmark og Evropasamveldinum og situr fyri málum, ið eru løgd til løgmann sambært stýrisskipan Føroya umframt uttanríkismálum.*

Porkeris kvøldskúli 2002/2003

Lærugrein:	Tíð:	Lærari:	Telefon:
Hondarbeiði	Tórsdag 19.30-22.30	Sonja Frederiksen	373 740
Postalínsmáling	Eftir avtalu	Irena Remmer	373 587/ 373 185
Seyming	Eftir avtalu	Anna A. Poulsen	373 829/ 373 185
Orgulspæl	Eftir avtalu	Jógvan Midjord	371 734

Øll skeiðini eru treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning myndugleikanna.

Luttøkugjaldið verður goldið fyrsta kvøldið, og tað er 300,- kr. fyri hvørt skeiðið, tó 200,- kr. fyri orgulspæl.

Tilmelding hjá lærarunum sum skjótast.

Porkeris Kvøldskúli · Tlf. 373 185

zarepta

Zarepta-legurnar 2002

m il, e la i a u á a a a ei a e s le u a e a á a so um á a e i 11. o obe il mi u a i 16. o obe .

e a e i 1 -1 á a omul o os a . 50,00 i ø , o að e ða os að báða e i .

Te i a le ulu a a um e am á l . 8 61 0

Te i a s a s l i e am á l . 3 03 0

Verið vælkomin til zarepta

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3437
Navn: Sp/f Dygdarsmíð
Adressa: Í Svanga 23, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 12.09.2002
Viðtøkudato: 12.09.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Martin Pætursson Hansen, Í Svanga 23, 100 Tórshavn.
Stjórn: Martin Pætursson Hansen, Í Svanga 23, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 12.09.2002 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at reka handverk, handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 19. september 2002

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3435
Navn: Sp/f Anastasia
Adressa: 900 Vágur
Kommuna: Vágs Kommuna
Stovningardato: 11.09.2002
Viðtøkudato: 11.09.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Sarina Rakul Paulina Augustinussen, 900 Vágur.
Stjórn: Sarina Rakul Paulina Augustinussen, 900 Vágur.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: Óli Regin Hansen, skrásettur grannskoðari, Tróndargøta 39, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 11.09.2002 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og reka handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 19. september 2002

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3436
Navn: Sp/f Heygabúðin
Adressa: Heygavegur, 700 Klaksvík
Kommuna: Klaksvíkar Kommuna
Stovningardato: 11.09.2002
Viðtøkudato: 11.09.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: :Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Bjarti Højbro, Geilin 10, 700 Klaksvík.
Stjórn: Bjarti Højbro, Geilin 10, 700 Klaksvík.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
Grannskoðari: P/F Føroyabók, v/ Victor Nielsen, Vágstún 2, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 11.09.2002 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er keyp og søla, umboðan og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 17. september 2002

Kristin Balle

i Sosialurin

Internet Sosialurin www.sosialurin.fo

Set sa l ning r



lasti er
goy sl

Slitster r iðl a al s r r

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

Linjumaður søkist til Elfelagið SEV

Søkt verður eftir einum fólki at arbeiða saman við linjumonnum okkara í Norðstreymoy.

Arbeiðið fevnir um hald og nýgerð av linjum, kaðalum og trafostøðum, og er fyri meginpartin í Norðstreymoy.

Einki beinleiðis útbúgvingarkrav er, men hava fólk við sveinabrævi sum elektrikari ella við øðrari viðkomandi handverkaraútbúgving so sum jarn- ella húsasmiðir fyrimun.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jón Nielsen, kaðal- og linjumeistara á tlf. 311366 ella 210464.

Umsóknir skulu saman við møguligum prógvum og ummælum sendast til Elfelagið SEV, Box 319, FO-110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 14. oktober 2002.

Tórshavn, tann 20. september 2002

Elfelagið SEV
Postboks 319, 110 Tórshavn
Teloefon (0298) 311366
Telefax (+298) 310366, E-mail sev@sev.fo

NIELS L. ARGE
HANDMADE JEWELLERY
ESTABLISHED 1932
Kongabrúgvin • 100 Tórshavn • Tel. 311731 • Fax 318532

Vit søkja eftir fólki at arbeiða á verkstaði okkara. Starvið er fulla tíð.

Er hetta nakað fyri teg, send okkum eina umsókn.

Niels L. Arge
Boks 169
FO-110 Tórshavn

Konfirmatións- klæðir til hansara

fáast í

Kallkyn Vágsbotnur
Tel. 31 62 06

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3438
Navn: Sp/f Frá 10. September 2002
Adressa: Á Fløtti 12, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 10.09.2002
Viðtøkudato: 10.09.2002
Kapitalur: Kr. 81.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 81.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: P/F Farodane, Brekkutún 4, 188 Hoyvík (P/F 49), P/F El & Tele, Argjaboðagøta 7, 160 Argir (P/F 2716), Sp/f Tøkni, á Fløtti 12, 100 Tórshavn (Sp/f 3069), Sp/f Met, J. C. Svabosgøta 8, 100 Tórshavn (Sp/f 1334), Sp/f Atlantic Online, 530 Fuglafjørður og Sp/f Hansoft, Klaksvíksvegur , 700 Klaksvík.
Nevnd: Rasmus Magnussen, Djúpagilsvegur 30, 188 Hoyvík (formaður), Ólavur Ellefsen, á Fløtti 12, 100 Tórshavn, Rolf Herup Olsen, Haraldstrøð 9, 100 Tórshavn, Birgir Waag Høgnesen, 350 Vestmanna, Robert Giehm, 530 Fuglafjørður og Esbern Hansen, Hamarsniðið 19, 700 Klaksvík.
Stjórn: Ólavur Ellefsen, Á Fløtti 12, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum, av 5 nevndarlimum í felag ella av allari nevndini í felag.
Grannskoðari: Sp/f Revisión v/ Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 10.09.2002 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at umboða áhugamál partaeigaranna í FARICE ætlanini, umframt at veita fjarskiftistænastur og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 19. september 2002

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2697, P/F Telefonverkið, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 16.09.2002.
Nýggj hjánøvn: P/F FarIce (P/F Telefonverkið) og P/F FarIce Føroyar (P/F Telefonverkið)

Skráseting Føroya tann 19. september 2002

Kristin Balle

www.sosialurin.fo

Sakarina

í Ítróttarhøllini á Skála leygarkvøldið 5. oktober

Tiltakið byrjar kl. 19.00 við stórum køldum borði og undirhaldi, sum Robert McBirnie skipar fyri. Borðhaldið endar um. kl. 23.00

Kl. 23.30 fer Sakarina á pallin og teir spæla til hl. 03.30

Atgongumerki til dansin: kr. 190,-
Atgongumerki til borðhaldið: kr. 175,-
seinasta freist at keypa atgongumerki til borðhalrið er 29. sept.

Bussamband
Bussar fara úr Havn og Vestmanna kl. 17.30 og 22.30. Tekning á tel. 216464/216465 og 424254/217752.
Bussar fara av Toftum og Fuglafirði kl. 18 og 23. Tekning á tel. 448456/225356 og 441305/228451.

Atgongumerki kunnu keypast:
í Joma á Skála, í Stranda Sentrum á Strondum
í Kunningarstovuni í Havn og á Statoilstøðunum
í Runavík, í Klaksvík og á Tvøroyri

Skála Ítróttarfelag

Teknmálsskeið í Sernámsdeplinum

Sernámsdepilin skipar fyri teknmálsskeiðum fyri starvsfólkum í skúlaverkinum og næstu avvarðandi at deyvum og ungum. Í hesum umfari er talan um 6 skeið á ymsum førleikastigum, øll á 20 tímar. Luttakaratalið er á øllum skeiðum í mesta lagi 12. Skeiðsdagarnir verða fríggjadagar og leygardagar kl. 9.00-18.00.

Ætlan:	Stig 1) Byrjunarskeið	04. og 05. okt. 2002
	Stig 2) "	11. og 12. okt. 2002
	Stig 3) Viðkað skeið	25. og 26. okt. 2002
	Stig 4) "	15. og 16. nov. 2002
	Stig 5) "	29. og 30. nov. 2002
	Stig 6) "	06. og 07. nov. 2002

Skeiðshaldari: Edny Poulsen, teksmálstulkur. Tlf. 318364, fartlf. 252135, e-mail: edny-p@kallnet.fo Hon leiðbeinir, um ein ivast, hvat stig ein skal fara á.

Skeiðsgjald: Fyri foreldur, systkin, abbar/ ommur og starvsfólk í skúlaverkinum eru skeiðini ókeypis. Fyri onnur er gjaldið kr. 2000 fyri hvønn til hvørt skeiðið.

Tilmelding: Boðið skjótast møguligt Sernámsdeplinum/Hildigunn Hansen frá luttøku. Tlf. 315422, fax 310196.

Møguliga kunnu vit eisini skipa fyri MHS-skeiðum (munn-/ hondskipan) um miðjan desember. Um áhugi er, ber til at boða frá í hesum viðfangi.

Sernámsdepilin